# Kjak



Hergeir Nielsen

## Helena skulkar

*Skattgjaldarin verður í hesum soppafongdu tíðum drigin eftir oyrunum fyri at umvæla 100 ára gamlar bygningar, samstundis sum landsstýrið brúkar 100 tals mió.kr. til at byggja nýggjar soppafongdar bygningar fyri*

Tað er altíð vandamikið at skulka, serliga um tú ert landsstýrismaður í skúlamálum.

Ásett er í stýrisskipanarlógini, at løgtingið hevur eftirlit við landsstýrinum.

Hetta eftirlit sæst aftur í orðaskiftunum á tingi og í starvinum hjá løgtingsgrannskoðarunum og landsstýrismálanevndini, í tingskipanini við samráðum, ófráboðaðum, munnligum, skrivligum og § 52a spurningum.

Øll tingfólk hava rætt til at spyrja, og landsstýrisfólk hava skyldu til at svara settum spurningum.

Í einum §52a fyrispurningi frá mær nú um dagarnar loyvir Helena Dam á Neystabø sær kortini at krúpa uttan um settu spurningarnar, og svarar í eyst, tá spurt verður í vest.

Svar hennara er bæði villeiðandi, skeivt og ófullfíggjað, og soleiðis skal ein landsstýrismaður ikki sleppa at skulka sær undan ábyrgdini í hesum máli.

Líka so umráðandi tað var at reka ungfólki í Suðuroynni út í Heiðarnar í Þorkerishaganum teirra bestu ár, líka so stóran dent leggur landsstýriskvinnan á at dylja, hvussu spinnandi galið tað eisini verkliga er við tí 100 mió. kr. dýra deplinum, har hýkur uppi.

Eg havi sett henni nakrar kontantar spurningar, og hon skulkar sær undan at svara teimum.

Hon svarar stutt sagt, at "- okkurt er galið í Hovi." Tað vita vit alt um, og vit eru fleiri, ið støðugt hava ávarað móti gallskapinum.

Fakligur dentur er hennara vegna kortini lagdur á at svara so kryptiskt, at eingin skal kunna koma afturum aftur og siga, at hon hevur svarað naka skeivt.

Tað er bara ikki gott nokk, og átalu- og revsivert er, at landsstýrismaður dylur nakað, hann veit, fyri løgtinginum, tá spurt verður so ítøkiligt, sum gjørt er í hesum føri.

Skattgjaldarin verður í hesum soppafongdu tíðum drigin eftir oyrunum fyri at bjálva og umvæla 100 ára gamlar bygningar móti soppum, roti og vánaligari inniluft.

Samstundis dylur landsstýrið okkara, at tað brúkar 100 tals mió.kr. til at byggja nýggjar soppafongdar og ivasamt bjálvaðar bygningar fyri - í bygd og bý - og ikki minst úti í bø og haga.

Eg fari tí at spyrja uppaftur og heita á landsstýrismannin sjálvan um at svara settu spurningunum á nøktandi hátt.

Er tað rætt, at fakliga væl grundgivnar tilráðingar eru komnar um at skræða stórar partar av skúladeplinum úti í Heiðunum í Þorkerishaganum niðuraftur ?

- at taka allan klædningin niðuraftur,
- at taka allan inndekning og avdekning heilt inn til vindsperruna niðuraftur,
- at gera fakliga rætt tættnigsarbeiði kring øll op við fugum og inndkningi
- at gjøgnumganga og skifta út alla skadda bjálving
- at montera manglandi bjálving við múrkrónuna
- at uppseta nýggja vindsperru við tætningslistum
- at uppseta nýggja alu klædningsplátu við tilhoyrandi inn- og avdekningi
- at seta upp nýggjar okar (leysholt)
- at seta upp nýggjan klædninging
- at umbyggja alu vindeygu og glaspartíir
- at taka niður allar gipsplátur kring vindeygu og glaspartíir
- at stórumvæla og leggja nýggja isolering og dampsperru á innveggirnar
- at bøta á fakligan hátt um ljóð- og brunasundurskiljingar millum tilhaldshøli
- at seta upp nýggjar gipsplátur og mála.

Er tað rætt, at stýrt varð uttan um omanfyri nevndu og aðrar trupulleikar, tá hesir vóru avdúkaðir í byggitíðini, enntá í einum partneringssáttmála, soleiðis at fakliga rættar loysnir ikki vóru valdar, hóast hesar gjørdust kunnugar undir sjálvari tilgongdini.

Sæð í ljósinum av omanfyri nevndu skakandi veruleikum, heldur landsstýrismaðurin so framvegis, at § 52a - svar hennara í fyrispurningi nr. 11/2010, var meira nøktandi enn villleiðandi?

Hvat kemur hetta nýggja projektið at kosta, og hvør fer at rinda kostnaðin?

---



Niels Midjord

## Borgarstjórin steðgaði lógarbroti

Má viðganga, at eg spílaði oyruni út, tá ið eg hoyrdi útvarpsmannin í tíðindasendingini týsmorgunin greiða frá, at borgarstjórin í Fuglafirði hevði givið tveimum russiskum skipum, sum lógu við bryggju og umskipaðu veiðu, boð um, at halda seg innan fyri tey mørk, sum umhvørvislógin setur fyri óljóð, men at skipini, í staðin fyri at laga seg eftir boðunum, vóru farin til Klaksvíkar at gera seg lidna at umskipa.

Væntaði satt at siga, at nú fór borgarstjórin at fáa eitt herðaklapp fyri sína djørvu avgerð, men tað øvugta hendi. Tað er ikki ov nógv sagt, at hann var settur í ringt ljós, og tú fekst fatan av, at her hevði hann ordiliga dummað seg.

Men tað, sum borgarstjórin hevði gjørt, var, at hann hevði steðga einum lógarbroti, og tað er hann sum evsti ábyrgdari av havnalagnum ikki bara í sínum fulla rætti til at gera, -tað hevur hann skyldu til! Tí umhvørvislógin er væl galdandi á havnaøkinum í Fuglafirði eins og alla aðra staðni í landinum. Ella tað er hon kanska ikki? Hon er kanska bara vøkur orð, sum ikki eiga at verða tikin í álvara?

Eg haldi, at útvarpsmaðurin skyldar borgarstjóranum í Fuglafirði eina umbering fyri hatta innslagið, tí um fjølmiðlarnir fara at eggja myndugleikunum at halda hándina yvir lógarbrot, hvar eru vit tá?



Hallur av Rana
*formaður í Ungmannafelag Miðfloksins*

## Ein tagnað rødd hoyrist aftur!

Hósdagin 6. oktobur varð stovnandi fundur hjá UfM hildin í Havn, og fegnast nevndin um avbera góða uppmøting. Ásannað varð, at síðstu tíðina hevur saknur verið í felagnum. Tískil avgjørdi fundurin at endurstovna tað.

Ynski felagsins, UfM, er at vera mótspæl móti tí liberala virðispolitikkinum, ið eyðkennir hini ungmannafeløgini og harvið vera rødd hjá einum stórum parti av Føroya fólki. Harumframt ynskja vit at mótmæla ósamhaldsfasta politikkinum, ið verður førdur í Føroyum í dag, og miða verður ímóti at vísa á betri loysnir og rættvísari sparingar, sum eitt alternativ til dagsins hjartaleysa politikk.

Aðalfundurin valdi 5 nevndarlimir og 2 tiltakslimir. Nevndin hevur skipað seg soleiðis:

Hallur av Rana
(Formaður).
Rani Andrasson Skaalum
(Næstformaður/skrivari).
Karin Oddsdóttir Lamhauge
(Kassameistari).
Dánjal Mouritsson Joensen
(Nevndarlimur).
Finnur Victorson Carlsen
(Nevndarlimur).
Rani á Borg
(Tiltakslimur).
Ari av Rana
(Tiltakslimur).

Vit fegnast um tað samstarv, sum longu er fingið í lag við onnur og síggja við gleði fram móti einari nýggjari tíð, har røddin hjá UfM enn einaferð fer at gera vart við seg.